# Hvar eru Suðuroyar listarnir til bý-og bygdaráðsvalið?

FINNLEIF GUTTESEN



Ein kendur javnaðarmaður skrivaði grein fyri trimum mánaðum síðani, við heitinum, "vendið flokkunum bakið til bý-og bygdaráðsval"!

Veljarar, sum atkvøða flokspolitiskt til kommunuval, eru bara atkvøðuneyt hjá býráðslimum, ið ikki kenna eina stevnuskrá frá telefonbókini. Flokkarnir fylgja allíkavæl ikki sínum stevnuskráum í kommunupolitikki.

**Vit mugu koma víðari í Suðuroy**

Fyri at koma úr naggatódnini í Suðuroy, er neyðugt at fáa fólk inn í bý-og bygdaráð, sum veruliga arbeiða fyri einari samanlagdari oyggj, tí sitandi "gomlu" býráðspolitikkarar hava ikki megna at koma úr stað. Hetta verður best tryggja, við at suðuroyarlistar/borgaralistar verða gjørdir, serstakliga á Tvøroyri og í Vági.

Á Tvøroyri sita býráðslimir, sum siga at teir vilja leggja saman, men at alt skal liggja á Tvøroyri og við tí hugburðinum koma vit ikki víðari, tað hava tey seinastu fýra árini so syrgiliga víst.

Í Vági er býráði ímóti at leggja saman, helst tí tey kenna hugburðin hjá býráðslimum á Tvøroyri, og tíverri hava báðir partar ikki hugsjón til at síggja út um egnar bøgarðar.

**Barnafrádrátt ella fundarpengar**

Men við nýggjum fólkið, ið veruliga ynskja at gera tað besta í einari samanlagdari oyggj, skuldi eingin vandi verði fyri, at nakar verður fyri mismuni.

Vit fáa betri møguleikar til at raðfesta barnaansing og byggja barnagarðar, gera umstøðurnar hjá skúlabørnum og lærarum betri, byggja røktarheim og bjóða okkara eldri betri tilboð, betra umstøður hjá vinnuni og ítróttarfeløgum, og ikki at gloyma, fáa færri býráðslimir og harvið spara fleiri milliónir í fundarsamsýning, sum ístaðin, til dømis, kunnu nýtast til at hækka barnafrádráttin.

Tí er tað so avgerandi, at velja tey røttu fólkini, sum siga tað tey meina, og ikki tey, sum siga eitt og gera nakað heilt annað og ið bert nýta veljaran sum hent atkvøðuneyt.

# Virkisføri aftur í hásæti

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



CHE samgongan setti sær ikki bara fyri at fremja høg politisk mál. Samgonguskjalið innihelt eisini orðingar um breiðar semjur á tingi, og enntá var orðið tjóðarsemjur nógv brúkt. Sum øllum kunnugt komu hvørki politikkurin ella tær breiðu semjurnar veruliga á breddan orsakað av innanhýsis órógvi og ósemjum.

Tað er ein sannroynd í politikki, at skal nakað fáast á skaftið, so nyttar ikki føra ein alt ella onki politik. Hetta hevur merkt føroyskan politik ov nógv, ikki minst hesar seinastu mánaðirnar. Tvørturímóti, so má ein í politikki allatíðina royna at finna loysnir, og fær ein ikki alt í senn, so má ein taka tað, sum ein fær semju um, og arbeiða víðari fyri at koma longur fram á mál. Í politikki er tað so, at mál skulu sodnast, og tekur tað ofta langa tíð. Hetta krevur tol og treiskni, og tað má ein politiskur flokkur, ið ynskir ávirkan, brynja seg við.

Nú ABC samgongan er við at verða komin undir land, skal tað vera mín vón, at tað eydnast at endurskapa virkisføri í politiska arbeiðinum, tað skylda vit Føroya fólki.

# Óundirbygdir flosklar - Uni og samsintir

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Fiskivinnan gevur sum heild ikki hall, men eigur enn grundarlagið undir føroyska samfelagnum og er avgjørt heldur eingin forðan fyri, at leik og lærd kunnu koma aftur úr útlondum og gera seg galdandi**

Eftir at hava lagt greinina hjá Una Arge, "Føroyar í politiskum kyksendi" í Dimmalætting 18. september, frá mær, spurdi eg meg sjálvan: "Liva vit veruliga í einum samfelag, har alt er so út av allari leið"?

Hóast lýsingin av Føroyum og lýsingarorðini annars vóru bæði víðfevnd og negativ, fari eg bert, fyribils í øllum førum, at taka eitt brot úr rokanum.

Hann sigur: "Fiskivinnan bindur túsuntals fólk til eina framleiðslu, sum gevur hall, hóast fiskimenn fáa 14 prosent í skattalætta. Hvussu nógva meining gevur tað?" Fari at bíða við brotinum um "Átrúna..", sum eg helst geri viðmerking til seinni.

Onki nýtt liggur í staðfestingunum í hesum báðum tættum hjá ávísum umhvørvi, men heldur verða teir oftari nevndir og vanliga óundirbygdir flosklar.

**Synergieffektin av fiskivinnuni**

Seinastu árini er talið á teimum, sum beinleiðis arbeiða í fiskivinnuni lækkað við fleiri túsund fólkum, m.a. tí tøknifrøðin vinnur inn. Helst eru "bert" eini 4.000 fólk av 26.000 eftir í okkara høvuðs útflutningsvinnu.

Hyggja vit at lønarútgjaldingunum í 2007, fór fiskivinnan o.o. ráðevnisátøk við smáum 1.5 mia. krónum av eini heildarúgjalding í lønum nakað undir 7 mia. kr., ella stívliga 21 prosentum.

Í 2007 var útflutningur føroyinga 4 milliardir krónur. Fiskavørur áttu 95% av útflutninginum, aðrar vørur 136 mió. krónur og skip 93 mió. krónur ella 5%.

Synergieffektin ella kringárinini av hesum útflutningi útloysa, umframt fiskivinnuna, eina lønarmongd uml. smáar 5,5 mia. krónur. Byggivinnan fer við 960 mió. privatar tænastur við 2.2 mia. og sum katakongur eru almennar tænastur við 2.3 mia. krónum.

Konservativt, fyri at brúka orðini hjá Una, kann sigast, at fiskivinnan í øllum førum fyri 70% viðkomandi beinleiðis og óbeinleiðis eigur lívið í føroyska samfelagnum. Henda vinna, sum Uni og hansara mongu líkar siga, gevur hall. Danski blokkurin, ikki at gloyma, eigur sín part.

**Hørð kapping uttanífrá**

Sjálvandi geva partar av fiskivinnuni hall av og á og onkrar hóðra ikki undan, men tað er hjálparleyst og óbúgvið at sleingja út, at "Fiskivinnan gevur hall..."!

Eitt afturat, sum Uni og samsintir gloyma, er hørðu kappingina uttanífrá, tá tey harmast um 14% skattalættan hjá sjómonnum. Vit missa dagliga dugnaligar sjómenn til Noregs og aðrar, men líkt er til, at Uni ikki heldur hetta hevur nakran týdning.

Onkur nevndi á heimasíðuni hjá Norðlýsinum, at bankastjóri skal hava sagt fyri 15 árum síðani, at best var at niðurleggja pelagiska flotan, tí hann einki gav. Sjálvur minnist eg ikki hesa útsøgn. Henda vinna hevur síðani givið gylt við framskygdum hugsjónarfólki, við nýggjum kostnaðarmiklum skipum og framkomnari tøkni.

Amerikansku úrmælingarnir Hickman og Silva, sum skrivaðu "Den dynamiske virksomhed", kom út í 1984, siga m.a. at "Skapanar-inlit er ein treyt fyri nýggjum uppfinningum". Vit eiga hóast alt ikki so fá hugsjónarfólk, sum búgva, hava hugsað og satsað her á landi, eisini uttanfyri fiskivinnuna, men sum Albert Einstein skal hava sagt, at: "Innliving er meiri umráðandi enn kunnleiki"! Hetta kann sigast um mangar føroyingar.

**Politikarar eru politikarar**

Hinvegin eiga vit ov nógv av fólki, sum eru droymarar, sum í ólukkumát geva politikarum skuldina. Politikarar eru, sum teir eru og fara at verða, ikki bara í Føroyum. Set teg inn í ummælini teir fáa í øðrum londum.

Nei Uni og samsintir, ið kanska liva í vardum umhvørvi: "Fiskivinnan gevur ikki hall, men eigur enn grundarlagið undir føroyska samfelagnum, og er avgjørt eingin forðan fyri, at bæði leik og lærd kunnu koma heimaftur úr útlondum og gera seg galdandi"!

Eisini tænir tað fiskivinnuni til heiðurs, at vit lutfalsliga eru komnir so langt á leið í oljuvinnuni og í íløgum annars.

Tað eru eisini heilt onnur viðurskifti en "konservatisma", sum ger, at vit ikki eru komin uppaftur longri fram, tað kann vendast aftur til seinni.

# Viðmerking til greinina "fimm minuttir ov langt burturi"

MARIN KATRINA FRÝDAL
forkvinna í teknisku nevnd, Tórshavnar býráð



Í Sosialinum tann 12. sep. 2008 er grein um undirskriftainnsamlingina á Velbastað og í Kirkjubø um vánaliga bussambandið til bygdirnar.

Sum forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar býráð, og tískil avvarðandi av bussleiðini, tykir mær, at neyðugt er við eini viðmerking til útsøgnina hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra, soleiðis at lesarin fær innlit í rætta samanhangin í hesum máli.

Borgarstjórin verður endurgivin fyri at siga, at hann er bjartskygdur um málið, at hann í hvussu er, er øgiliga positivur fyri tí, og at hann metir tað vera rætt, at búfólkið í Kirkjubø og á Velbastað fáa tað bussambandið, sum tørvur er á.

Men tað, sum Heðin Mortensen ikki sigur, er, at hann sjálvur, sum borgarstjóri og harvið eisini sum formaður í fíggjarnevndini, ikki hevur viljað tikið undir við einum meiriluta í teknisku nevnd um at játta nakrar túsund krónur til at seta eyka túrar inn í verandi bussleið til Velbastaðar og Kirkjubøar. Hettar hendi bæði í fíggjarnevndini 23. januar og aftur í býráðnum 27. mars, eftir at undirritaða hevði kravt málið fyri býráðið.

Tíverri vendi tíðindamaðurin sær ikki til undirritaðu, sum ábyrgdarhavara av bussleiðunum í kommununi at fáa málið gjølliga og rætt lýst. Lesarin kann somuleiðis fáa ta misfatan, at ókeypis koyringin ikki er galdandi fyri hesa farleiðina. Men so er ikki, tí sjálvandi er bussleiðin til Velbastaðar og Kirkjubøar eisini ókeypis.

Fyrrverandi Kirkjubøar kommuna skrivaði undir ein langtíðar sáttmála við bussfelagið, sum røkir leiðina í dag, ið røkkur heilt fram til 2010. Hetta gjørdi gamla bygdarráðið vælsaktans, tí at tey hava verið nøgd við farleiðina og/ella við ótta fyri at fáa tað verri undir Tórshavnar kommunu. Men tíðin stendur ikki í stað, og greitt er nú, at borgarar heimanfyri hava eina nógv verri bussleið, enn onnur í kommununi. Ímillum politikarar í kommununi er ikki sjáldan at hoyra slíkt sum: tey kunnu ikki vænta sær alt beinanvegin – tey hava fingið nýggjan dagstovn, reinsiverk v.m., og tískil hevur ikki verið undirtøka fyri at siga verandi sáttmála upp. Í 2010 ganga allir bussáttmálar kommununnar út, og arbeiðið er byrjað við at gera nýtt útbjóðingartilfar fyri allar bussleiðirnar; og tá skulu øll javnstillast í kommununi.

Lagt kann verða aftrat, at semja fekst í teknisku nevnd hóskvøldið 18. sep. um at víðka koyringina heimanfyri beinanvegin við tveimum túrum gerandisdagar, tað ið eftir er av árinum, og at áheitanin frá borgarum í Kirkjubø á Velbastað um betri bussamband verður tikin við í fíggjarætlanina fyri 2009.